Álit

í

løgtingsmáli nr. 31/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin) (Sektir fara sum høvuðsregla í landskassan)

Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum hevur lagt málið fram tann 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 7. november 2025 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. og 25. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið er úrslit av, at landsstýrið og danska stjórnin hava undirskrivað eina nýggja avtalu um at broyta býtið av sektarúrtøkuni millum ríkiskassan og landskassan. Avtalan varð undirskrivað 17. juni 2025 og kemur í gildi 1. januar 2026.

Sambært avtaluni fara inntøkur frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar fyri brot á lóggávu á yvirtiknum málsøkjum, frameftir í landskassan. Inntøkurnar frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í felagsmálum, fara í ríkiskassan. Undantiknar hesi avtalu eru inntøkur, sum stava frá handhevjingini hjá løgregluni í Føroyum av føroysku ferðslulógini. Hesar fara framhaldandi í ríkiskassan.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 28. november 2025

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen	Ingilín Didriksen Strøm
Kristianna W. Poulsen	Henrik Old	Steffan Klein Poulsen
	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	